

Mynd: BP

# Bretland: Framtíðin hjá oljuvinnuni tykist døkk

**Jógvan Hugo Gardar**

10.09.2015 - 16:43

Oljan.fo

Íløguhugurin minkar i stórum, so hvørt sum oljuprísurin lækkar. Í eini frágreiðing frá bretska orkumálaráðnum verður víst á at samlaðu íløgurnar í oljuvinnuna í bretska partinum av Norðsjónum kunnu fara niður í eina helvt eftir tveimum árum.

Sambært Financial Times meta bretskir myndugleikar at samlaðu íløgurnar í Norðsjónum fara at lækka við millum tvær og fýra milliardir bretsk pund frá nú og fram til 2017. Samstundis koma, sambært frágreiðingini, íløgurnar til nýggjar oljuleiðir at minka til á leið tríggjar milliardir pund um árið, samanboið við tíggju milliardir pund í tíðarskeiðnum millum 2011 og 2013.

- Hetta eru ikki góð tíðindir fyri Bretland. Hetta minkar um okkara møguleikar til at menna nýggjar ætlanir, sigur fíggjarstjórin í Oil & Gas UK, í samrøðu við Financial Times.

Hann vísir á at tann størsti trupulleikin verður at fáa útelndskan kapital at gera íløgur í tær dýrastu ætlaninar.

Oljan úr Norðsjónum stendur fyri umleið einum triðingi av orkutilfeinginum hjá Bretlandi, og oljuvinnan hevur árliga eina inntøku uppá umleið 40 milliardir pund. Harafturat kemur at nógv fólk eru knýtt til oljuvinnuna, og lági oljuprísurin ger at færri arbeiðspláss vera í hesi týdningarmiklu vinnuni fyri landið.